## Fleiri summarlegur

Aftur í ár skipar Heimamissiónin fyri fleiri summarlegum. Summarlegurnar eru skipaðar sum barna-, junior-, ungdóms- og familjulegur. Á leið 1200 børn, juniorar og ung eru vanliga á hesum legunum. Legurnar hjá Heimamissiónini hava hvønn dag bíbiltímar, spøl og kappingar sum part av skránni. Til ber at tekna seg á heimsíðuni www.mission.fo ella á tekningarseðli.



## Ódn kravt 12 mannalív

Tropiska ódnin Gomu herjaði í gjárkavøldið Oman í Persiska Flógvanum. Myndugleikarnir í Oman siga, at ódnarveðrið hevur kravt tólv mannalív, og at næstan allur høvuðsstaðurin, sum eitur Muscat, stendur undir í vatni. Gomu er nú á veg ímóti Iran, og hóast ódnin er linkað eitt sindur, hava iransku myndugleikarnir flutt fleiri hundrað fólk burtur úr økjum, sum ætlandi fáa vitjan av Gomu í dag. Iranar vænta kortini ikki, at ódnarveðrið fer at raka landsins oljuútbúnað.

# ddu rætt



*Teir vóru sera væl nøgdir við avrikið, FSF-formaðurin Óli Holm, fyrrverandi VB-stjørnan Páll Augustinussen og Jens Erik Magnussen, drúgvur formaður í landsliðsnevndini fram til aðalfundin seinast*



*So er endiliga tíð at slappa av. Óli Johannesen saman við konuni Randi Weihe og dóttrini, Onnu Óladóttir á arminum*



*Summir av skotunum fingu sær hvíld í góðveðrinum fyrrapartin í gjár. Her fær ein sær lítlan lúr á Tinghúsvøllinum*

minsta lagi skeivari nøs. Tað tók læknastabi og fysioterapeutum fullar tíggju minuttir at finna út av, at Óli kundi fara á vøllin aftur, bara fyri at kosta føroyingum fyrsta málið.

Fyri tað fyrsta er tað undir alt lágmark, at nýta so langa tíð um at taka eina avgerð – og so megnar mann allíkavæl at taka ta skeivu avgerðina! So har reyk tann potentielli fantastiski sigurin.

Ná, men bannanin innantanna fram til seinna hálvleik var einki at meta samanborið við ta frøi, mann kendi av føroyska spælinum eftir steðgin. Tað var simpulthen suverent. Tá eg plagdi at fylgja føroyska landsliðnum tætt fyri 15-17 árum síðani fingu vit javnan bæði heiðurlig og sera góð úrslit, men ongantíð hevur eitt føroyskt landslið spælt so væl, sum garparnir gjørdu á Svangaskarði í gjárkvøldið. Eg sat púra býttur. Hevði ikki ánilsi av, at eg kundi gerast so ivrigur í fótbólti longur. Uppdagaði fleiri ferðir, at eg stóð uppi og hálvgum rópti og gelti. Men eg var ikki einsamallur, sá eg eisini, tí sjálvt gamla landsliðskempan og verandi venjari hjá B36, Kurt Mørkøre hevði hug at leypa uppfrá viðhvørt.

Eg kann ikki lata vera við at nevna tríggjar leikarar, sum vóru heilt framúr hendan hálvleikin. Fyrst Súni Olsen, sum uttan nakra sum helst diskussión var fleiri støði yvir øllum hinum leikarunum á vøllinum yvirhøvur – íroknað skotsku stjørnurnar. Víðari frágreiðing er óneyðug, tí tær nýtist á ongan hátt at hava skil fyri fótbólti fyri at síggja, at hetta var nakað serligt.

Harnæst mín góði vinur Mikkjal, sum plagar at skjóta harur saman við okkum úti í Nólsoy. Sjálvt ein Norman Hunter, ein Gravesen, Tøfting ella fyri tann søks skuld Gattuso verða øvundsjúkir, tá teir síggja innsatsin hjá politistinum úr B36.

Og síðst, men kortini ikki minst Christian Holst, sum hevði ein framúrskarandi dyst í álopinum og vísti, at hann kann »hamla« upp við í hesum førinum skotsku verjuna, og spæla møguleikaskapandi stikningar sjálvt í trongdari støðu.

### Teir fingu rætt

Skotarnir hildu ein øgiligan levint og gang í fyrra hálvleiki, og meðan steðgur var, nýttu teir høvið at flyta seg frá eystara málinum, sum føroyingar vardu í fyrra hálvleiki, til vestara málið. Filosofiin var nokk, at teir vildu vera har, sum tað hendi.

Fyrstu løtuna vóru teir eisini óførir at rópa, men stutt inn í seinna hálvleik var týðiligt, at føroyingar fullkomiliga áttu spælið, og í takt við at føroyska liðið kroysti skotar longur og longur aftur á vøllin, tagnaðu skotsku rópini. Og tá hálvleikurin var hálvrunnin hoyrdi mann ikki eitt kis til gestirnar, meðan ein klumpur av føroyskum áskoðarum aftan fyri málið hjá Jákupi Mikkelsen við taktføstum trummusløgum áttu alla verbala uppmuntring kring vøllin.

Ongantíð hava føroyingar niðurspælt eitt annað landslið – á slíkum støði – so, sum skotar vórðu tað mikukvøldið. Og ongantíð hevur eitt lið verið so óheppið, sum tað føroyska var í hesum dystinum. Eingin – heldur ikki skotar – kundu sagt nakað um tað, hvødu vit vunnu dystin. Og um hann so endaði 5-2 til Føroyar, so hevði tað heldur ikki veri órættvíst, tí vit høvdu í hvussu er so nógvar málgevandi møguleikar.

Kanska var tað hetta, skotar sannaðu, tí har var einki sum helst lív í teimum á veg suður aftur til Havnar við Smyrli. Einasti, ið royndi at spjaða eitt sindur av gleði, var Heðin Luid, sum í skotskum kilti klimpraði uppá ein gittara, meðan nøkur fá tandur - íroknað einar triggjar-fýra skotar – royndu at hjálpa til við sangi viðhvørt.

Nú endaði tað altso, sum skotar høvdu spátt í Sosialinum fyrr um dagin, 2-0 til gestirnar. Men eftir seinna hálvleiki at døma er tað kanska ikki meiri enn rímiligt, at føroyski venjarin fær ein møguleika aftrat, eisini hóast hann við ófatiligari óprofessionelismu ikki dugdi at síggja, at ein útskifting av Óla Johannesen so avgjørt var »called for«. Ein feilur, sum allarhelst kostaði í minsta lagi eitt stig.

Um altso »súr rønneber« skulu krøkjast upp í endan á greinini.